| 3. Umfar tann 2012/08/30 kl. 15:00 | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Bo. | 74 | Faroe Islands | Elo | - | 7 | Azerbaijan | Elo | ½ :3½ |
| 3.1 | IM | Ziska, Helgi Dam | 2469 | - | GM | Radjabov, Teimour | 2788 | 0 - 1 |
| 3.2 | IM | Nilssen, John Arni | 2372 | - | GM | Safarli, Eltaj | 2620 | ½ - ½ |
| 3.3 | IM | Rodgaard, John | 2354 | - | GM | Mamedov, Rauf | 2634 | 0 - 1 |
| 3.4 | | Andreasen, Joan Hendrik | 2260 | - | GM | Guseinov, Gadir | 2613 | 0 - 1 |



Á fyrsta borði telvaði Helgi móti nr. 4 á FIDE-ratinglistanum Teimour Radjabov 2788, og tað varð milt sagt eitt øgiligt talv. Beinanvegin í byrjanini lat Teimour ein riddara fyri 2 finnur, og hettar gav honum gott spæl og eitt ómenniskjaligt trýst á hvíta kongin. Endin var eisini, at Helgi gjørdist óneyvur og mátti lúta.



John Arni bjargaði æruna hjá liðnum, við at telva javnleik á 2. borði. Tað var ikki væntandi, at nakað stig skuldi fáast burturúr við svarta fólkinum, men skjót og góð telving frá skopuninginum gav ½ stig í skjáttuna - eitt flott úrslit !




John Rødgaard telvaði eina varna byrjan og sá tað bara heilt gott út leingi. Men so hvørt sum tíðin byrjaði at ganga undan, bleiv fyrimunurin hjá mótstøðumanninum størri, og til endans mátti John leggja kong.



Jóan Hendrik royndi alt hvat hann kundi, men ein stórmeistari við hvíta fólkinum er ikki lættur at syfta. Trýstið bleiv ov stórt og enn eitt stig til Azerbaijan.

Endaliga úrslitið gjørdist tískil ½ - 3½ til Azerbaijan. Um man kann tosa um heiðurlig tap, so var hettar eitt av teimum.